# Føroya Banki keypt fyri 47 milliónir í Íslandi

**Føroyski bankin hevur í morgun keypt meirilutan í tryggingarfelagnum Vørður Tryggingar í Íslandi. Kostnaðurin fyri meirilutan er 47 milliónir krónur, og keypið er komið í lag eftir umbøn úr Íslandi**

VINNULÍV
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Ætlanin var, at videofundur skuldi vera í hølunum hjá Føroya Banka, men teknikkurin vildi ikki heilt, so Johnny í Grótinum, íløguleiðari, umboðaði bankan á tíðindafundinum í Føroyum, nú Janus Petersen, forstjóri, og Súni Schwarts Jacobsen, stjóri, eru í Íslandi og skriva undir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fimm ára gamla íslendska tryggingafelagið Vørður er í morgun vorðið føroyskt. Føroya Banki hevur nevniliga sett 48 milliónir krónur í felagið, og hetta gevur ein ognarlut á 51 prosent.

Feløgini, sum hava selt til Føroya Banka, eru sparikassin Byr, Landsbanki Íslands, umframt SP-Fjarmøgnum. Hesi seinastu eru almennar fyritøkur í dag.

Tað var eftir eina umbøn úr Íslandi, at Føroya Banki gjørdi av at keypa meirilutan í tryggingarfyritøkuni, eftir at dótturfelagið hjá Føroya Banka, Trygd, hevði gjørt kanningar av Vørði.

Vónin hjá Íslendingum við at fáa Føroya Banka við er, at fáa ein sterkan parteigara, sum kann skapa álit.

## Royndir við Trygd

Johnny í Grótinum, íløguleiðari hjá Føroya Banka, greiðir frá, at bankin sá ein møguleika at vaksa, sum er partur av ætlanini hjá bankanum.

- Vit sóu ein møguleika at vaksa, og vóna at kunna skapa synergiir við dótturfyritøkuni hjá okkum, Trygd, sum vit hava havt sera góðar royndir við seinastu 10 árini, staðfestir Johnny í Grótinum.

Reint tekniskt er tað Føroya Banki, sum eigur Vørð, so keypið hevur við sær, at Føroya Banki nú hevur tvey dótturfeløg, sum selja tryggingar.

Vørður hevur umleið ein tíggjundapart av marknaðinum í Íslandi, og menning hevur verið seinastu árini. Tryggingarfelagið hevur somuleiðis umleið 28.000 kundar.

## Ongar broytingar

Hóast føroyingar nú eita meirilutan í Vørði, so merkir tað ikki, at broytingar verða gjørdar í íslendska tryggingarfelagnum.

- Í verandi løtu verða ongar broytingar gjørdar í fyritøkuni í Íslandi, tí vit hava fult álit á virkseminum, sum er farið fram. Vit meta somuleiðis, at ein av styrkunum við Vørði er, at felagið ikki hevur tryggjað íløguvirksemi og tílíkt, og tí meta vit, at felagið stendur væl, og ikki hevur nógv lík í skápinum, sigur Johnny í Grótinum.

## Vaksa meira

Føroya Banki hevur leingi ligið upp á lúr at keypa ein banka í Danmark, og hóast íløga nú er gjørd í Íslandi, so merkir tað ikki, at bankin hevur slept teimum ætlanunum.

- Vit bíða framvegis eftir einum møguleika, at keypa ein lítlan banka í Danmark, staðfestir Johnny í Grótinum.


# Fráboðan til parteigarar í P/F Atlantic Petroleum

Vísandi til ásetingarnar í § 34 stk. 2 í partafelagslógini verður við hesum boðað parteigarunum í P/F Atlantic Petroleum (P/F nr. 2695) (hereftir nevnt felagið) frá, at nevnd felagsins á nevndarfundi tann 1. oktober 2009 við heimild í grein 3 í viðtøkum felagsins, hevur viðtikið at hækka partapening felagsins við í minsta lagi DKK 54.526.200 í nominellum virði og í mesta lagi DKK 150.097.300 í nominellum virði við útboði til tekningar av nýggjum partapeningi við fortekningarrætti fyri verandi parteigarar í lutfallinum 4:3, tvs. 4 nýggj partabrøv fyri hvørji 3 verandi partabrøv. Tekningskursurin er 125.

Tekningartíðarskeiðið er frá 8. oktobur 2009 til 27. oktobur 2009 kl. 18.00 føroyska tíð (sama sum 19:00 CET og 17.00 íslendska tíð).

**Fortekningarrættir**

Tann 7. oktober 2009 kl. 11:30 føroyska tíð (sama sum 12:30 CET og 10:30 íslandska tíð) fær hvør tann, ið júst tá hjá VP Securities A/S er skrásettur sum parteigari í felagnum, tillutað fortekningarrættir. Parteigarar, ið framvegis hava papírspartabrøv í felagnum, skulu venda sær til P/F Eik Banki, Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, Føroyar fyri at fáa sínar fortekningarrættir í hendi.

**Nýtsla av fortekningarrættum:**

Tekning av nýggjum partapeningi við støði í fortekningarrættum skal fara fram í tekningartíðarskeiðnum frá 8. oktober 2009 til 27. oktober 2009 kl. 18.00 føroyska tíð (sama sum 19:00 CET og 17.00 íslendska tíð). Minsta upphædd teknast kann er eitt partabræv, ið krevur nýtslu av trimum fortekningarrættum og gjald av tekningarprísinum DKK 125.

Hvat viðvíkur fortekningarrættum á partabrøvum skrásett umvegis VP Securities A/S, so kunnu parteigarar við slíkum, ið ynskja at nýta fortekningarrætt sín, venda sær til kontoførandi peningastovn sín fyri partabrøvini sambært reglugerð fyri kontoførandi peningastovnin, og nýta fortekningarrættin ímóti gjaldi av tekningarkursinum.

Hvat viðvíkur fortegningarrættum á papírspartabrøvum, so kunnu parteigarar við slíkum, ið ynskja at nýta fortekningarrætt sín, gera hetta við at venda sær til P/F Eik Banki, Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, Føroyar telefon nr. + 298 348 000 fyri at nýta fortekningarrætt sín við at lata inn papírspartabrøvini til Eik Banka, nýta fortekningarrættin og gjalda tekningarkursin. Eru papírspartabrøvini burturblivin, verða nýteknaðu partabrøvini hildin í varðveitslu, til burturblivnu papírspartabrøvini eru endaliga mortifiseraði.

**Handil við fortekningarrættum.**

Fortekningarrættir kunnu handlast á NASDAQ OMX Iceland og NASDAQ OMX Copenhagen í tíðarskeiðnum frá 5. oktobur 2009 til 22. oktobur 2009 kl. 15:23 íslendska tíð á NASDAQ OMX Iceland og kl. 17.00 CET á NASDAQ OMX Copenhagen.

**Tekningarlistar:**

Prentað eintak av tekningarlistum saman við viðtøkum felagsins, ársroknskapi felagsins fyri síðsta roknskaparár, frágreiðing nevndarinnar eftir § 29 stk. 2 í partafelagslógini og váttan frá grannskoðara felagsins og § 33 A frágreiðing nevndarinnar alt sum partur av prospekti, útgivið í sambandi við útboðið er tøkt á hesum støðum: hjá Handelsbanken Capital Markets, Havneholmen 29, DK-1561, København V, Danmark (telefon nr. +45 3341 8200), Eik Banki, Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn (telefon 348 000). Nevnda tilfar liggur eisini frammi og er tøkt á skrivstovu felagsins, og kann, við ávísum undantøkum, verða heintað niður av heimasíðu felagsins: www.petroleum.fo.

Henda fráboðan er givin sambært ásetingunum í § 34 stk. 2 í partafelagslógini sum kunning til parteigarar felagsins. Allar íløgur í útbjóðaði partabrøv og/ella tekningarrættir skulu vera grundað á prospektið hjá felagnum dagfest 1. oktober 2009. Fráboðanin skal ikki almannakunngerðast ella býtast út í USA, Kanada, Australiu ella Japan. Henda fráboðan er ikki send út í USA og má ikki býtast út til persónar í U.S.A (sum allýstir í Regulation S í U.S. Securities Act frá 1933 við seinri broytingum ("Securities Act")) ella brúkast í útgávum, sum vanliga koma út í USA. Henda fráboðan er ikki eitt tilboð ella ein innbjóðing um at keypa virðisbrøv í USA. Partabrøvini og fortekningarrættirnir í P/F Atlantic Petroleum eru og verða ikki skrásettir undir Securitis Act og mugu ikki verða boðin, seld ella handlaði í USA ella til persónar úr U.S.A, uttan so, at transaktiónin er undantiknin frá, ella umfatað av skrásetingarkrøvunum í U.S. Securities Act, Stabilization/FSA.

*Tórshavn, tann 5. oktober 2009*

**P/F Atlantic Petroleum**

Gongin 9 · Postboks 1228 · 110 Tórshavn
telefon 350100 · Faks 350101 · www.petroleum.fo

Atlantic Petroleum